**bóka ummælið**

mortan@hamrabyrgi.com




# 200 uppskriftir

Á summarmáladegi 14. apríl hevur landsstýrissamgongan sitið í 200 dagar. Sama dag gevur punkrokk-bólkurin 200 út nýggja fløgu, ið eftir øllum at døma fær heitið Stockholm-syndromið. Herfyri gav forlagið Lindhardt & Ringhof út kókibóka-røð um 200 tema-uppskriftir.

"200 Fedtfattige Retter" kundi verið ein uppløgd gáva til samgonguna í sínum royndum at slakna fíggjarætlanirnar á almennu stovnunum.

"200 Lækre Kager" kundi so verið gávan til 200-fjepparan.

"200 Pastaretter", "200 Nemme Middage" er heitið á hinum 200-kókibókunum.

4 bøkur í alt eru í røðini, ið hava hvør sín høvund. Talan eru um týddar kókibøkur, ið fáast til keyps til sera rímiligan penga.

Felags fyri tær er, at tær eru snøgt og greitt uppsettar. Myndir eru til allar uppskriftirnar, ið eru líka til at fara í holt við. Talan er um spennandi uppskriftir, ið saktans kunna bjóða av eina køna kókikonu. Og novican verður væl leidd inn í køks-heimin. Frálík bókarøð til ungdómin, ið flytir heimanifrá og skal royna seg á fyrsta sinni í einum køki. Sjálvt vegleiðingar um rávørur og kókstól, ið eg altíð eftirspyrji er komið við í hesar fittu kókibókur.

Og ja, tær liggja væl í hondunum.

200 Nemme Middage, Jo McAuley, Lindhardt & Ringhof, 240 blaðsíðir, heft, uml. kr. 65 í føroysku bókabúðunum

200 Pastaretter, Maria Ricci, Lindhardt & Ringhof, 240 blaðsíðir, heft, uml. kr. 65 í føroysku bókabúðunum

200 Lække Kager, Sara Lewis, Lindhardt & Ringhof, 240 blaðsíðir, heft, uml. kr. 65 í føroysku bókabúðunum

200 Fedtfattige Retter, Cara Hobday, Lindhardt & Ringhof, 240 blaðsíðir, heft, uml. kr. 65 í føroysku bókabúðunum

P.S. Ein vinmaður, ið er tónleikaummælari, gav sítt besta skoðsmál til "200 Nemme Middage", ið hann testaði eina viku. "Píkarillurnar, haldi eg fari at keypa hasa bókina", vóru orðini, tá ið hann smáslevandi handaði hana aftur.

**Mortan í Hamrabyrgi umrøður nýggjar bøkur um mat og drekka**








